# Havnar Bio

UMMÆLI:

# At ikki flyta heiman



**Tripp er 35 ára gamal, han hevur eitt gott arbeiði, ið loyvir honum at hugna sær við sínum áhugamálum, ið er at sigla. Hann nýtir livið, fær klæðini vaskað og matin serveraðan, tí hann býr hjá mammu síni, júst sum ein tannáringur, men Tripp er ikki 15, men 35 ára gamal**

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Tripp er eingin nørdur, hann hevur bert ikki sæð, hví hann skal flyta heimani frá mammu og pápa. Hann hevur nógvar vinir, damurnar dáma hann eisini, men sannleikin er helst, at Tripp hevur ongantíð møtt røttu kvinnuni, ið kann fáa hann at skapa eina nýggja tilveru.

Foreldrini vóna, at hann er ein sum kann lokkast at flyta heimani frá, tí fáa tey Paulu at hjálpa teimum, ið er eitt slag av coach, ið livir av at lokka ungar menn heimanifrá og burtur frá trygga heiminum hjá foreldrunum.

Tað finnst nógvir slíkir menn, ið ikki duga at hertaka heimin og leggja verðina undir seg sjálvir, teir skulu hava eitt spark í reyvina.

Tripp er tó ikki sum aðrir gamlir dreingir, ið klistra seg til heimið, tí hann hevur eina meining um, hvat er besta loysnin fyri hann, og hann sær skjótt, at Paula hevur ein annan dagsordan, enn hon sigur seg hava.

**Feelgood kærleiksfilmur**
Filmurin gongur við, at hesi bæði royna at lumpa hvørt annað, tey kappast um orð, leggja fellur fyri hvørt annað og berjast ein vónleysan bardaga móti ikki at gerast forelskað, ið vit sjálvandi vita, at tey fara at gerast til endans.

Hesin filmurin, ið eitur Failure to Launch á enskum, tekur eitt nýtt evni upp, har ungir ella vaksnir menn kunnu vit siga ikki vilja flyta heimanífrá. Leikstjórin Tom Dey, sigur at hetta er eitt vaksandi fyribrygdi, at vit kunnu tosa um Boomeang-ættarliðið, har tey ungu ikki flúgva heimani frá reiðrinum. Hetta er eitt altjóða fyribrygdi meinar leikstjórin, tí vit kenna øll onkran, ið ikki er fluttur heimani frá sum vaksin.

Tom Dey brúkar hetta evni a ein sera brúktan og slitnan hátt. Hetta er enn ein av hesum ótalligu romantisku feelgood skemtifilmunum. Felags fyri allar hesar filmar, er at fólkini síggja gott út og at tey altíð fáa hvønn annan í endanum.

**Standard vøra**
Hesin filmurin er ein gjøgnumførd standard vøra, eitt sera vanligt dømi, ja nærum sjálvt grunddømi um eina vanligan kærleiksleiks/skemtifilm, har veruliga góðskan vísir seg í, um hann er sjarmerandi og megnar at siga frá hesum vælkendu og banalu søguni við yndi. Filmurin Så flyt dog hevur tó ikki tað sum er neyðugt til at skapa ein av teimum stóru kærleiksfilmunum. Hetta er eingin Annie Hall, When Harry Met Sally, Some Like It Hot, The Apartment, The Graduate ella Pretty Woman. Her er ikki sama sjarman sum í www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/0800141660/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance" Sense and Sensibility, www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/B00005JCA9/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance" Notting Hill, /www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/6305368171/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance" You've Got Mail, /www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/B000035Z1Z/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance" French Kiss, www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/0780622588/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance"The Wedding Singer, www.amazon.com/exec/obidos/tg/detail/-/B00005O5CM/ref=cm_bg_d/002-8914778-4208007?v=glance" Legally Blonde og aðrir.

Tað er einki galið við kærleikskomediuni, tað er bert so óendaligur munur á filmunum. Eitt meistaraverk sum Annie Hall hjá Woody Allen kemur at standa næstu 100 árini, meðan hesin filmurin er gloymdur longu tá fólk ganga út úr Havnar Bio.

**Hví ikki screwball?**
Hollywood hevur altíð arbeitt við hesum filmslaginum. Í 1930inum kom eitt filmslag fram, ið varð kalað screwball (Screw-ball) ella skrue'bol, ið bæði er ein komedia um virði og um kærleika, mangan sett upp sum sera undirhaldandi søgur, kendir leikstjórari í 30inum, ið gjørdu slíkar filmar vóru t.d. us.imdb.com/M/person-exact?Wilder,%20Billy" Billy Wilder, us.imdb.com/M/person-exact?Brackett,%20Charles" Charles Brackett, http://www.scene360.com/EDITINGroom_Hawks.html" Howard Hawks og http://us.imdb.com/M/person-exact?Capra,%20Frank" Frank Capra.

Eitt sum eykendi hesar søgur, var at alt var viðvent, og øvugt, hin ríki var í veruleikanum fátækur, hin býtti klókur o.s.fr. Tá tvey møttust, so gjørdust tey ikki forelskaði við tað saman, men skuldu berjast eina tíð, við m.a. at lúgva fyri hvørjum øðrum, men altíð endaði hetta við at tey forelskaðu seg til endans.

Hetta er eitt sera borgarligt filmslag, sum í ævintýrunum, so skuldi høvuðspersónurin altíð á eina vandafulla ferð og endamálið við tí heila var at tey skuldu giftast í endanum. Tað er ein serligur andi yvir at síggja Cary Grant, William Powell, HYPERLINK "http://us.imdb.com/M/person-exact?Lombard,%20Carole" Carole Lombard, Claudette Colbert og Katharine Hepburn spæla hesar filmar, men Så flyt dog kemur heldur ikki uppá øklanar á hesum stóru gomlu forgangarum, ið hann roynir at líkjast.

Matthew McConaughey og Sarah Jessica Parker eru ikki fólk sum siga mær nakað sum helst. Serliga ikki Parker, ið bert fær meg at hugsa um 10.000 partar um yuppie lívsstíls snobbakvinnurnar í Sex and the City.

**2 stjørnur av 6.**

TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




## Firewall — *FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 21.04 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 22.04 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 23.04 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |




## Ace Age 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 21.04 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Leygardag | 22.04 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Sunnudag | 23.04 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |




## Bambi 2

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 21.04 | kl. 18.30 | |
| Leygardag | 22.04 | kl. 18.30 | |
| Sunnudag | 23.04 | kl. 17.30 | *Seinasta sýning* |




## Så flyt dog!

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 21.04 | kl. 20.30 | |
| Leygardag | 22.04 | kl. 20.30 | |
| Sunnudag | 23.04 | kl. 19.30 | |




## Inside Man

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 21.04 | kl. 23.00 | |
| Leygardag | 22.04 | kl. 23.00 | |
| Sunnudag | 23.04 | kl. 22.00 | |

## KOMANDI FILMUR




## Scary Movie 4 — *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 28.04